Vikuskiftis Sosialurin



## Loppumarknaður á Handilsskúlanum í Havn

Í morgin, leygardagin, frá klokkan 10-17 skipar 2. HHB á Handilsskúlanum í Havn fyri loppumarknaði á handilsskúlanum í Marknagili í Havn. Næmingarnir siga, at har verður alt millum himmal og jørð at fáa til keyps. Tey hava savnað alskyns lutir saman til endamálið. Eisini selja tey kaffi og vaflur – og alt verður selt sera bíliga, siga næmingarnir.



## Chavez styðjar loysingarmenn

Forsetin í Venesuela, Hugo Chavez, segði í gjár, at hann styðjar tær kreftirnar í Abkhasia og Suðurossetia, sum gjørdu av at loysa tey bæði lýðveldini frá Georgia og at leita sær russiska vernd ístaðin fyri. Chavez er á almennari vitjan í Russlandi, og tað var á einum fundi við Dmitrij Medvedev, forseta, at hann segði seg styðja loysingarkreftirnar í Abkhasia og Suðurossetia. Seinasta summar var kríggj ímillum Georgia og Russland um tey bæði lýðveldini, sum seinni hava lýst sjálvstøðug við stuðuli frá russum.

# Skiparar kundu sloppið við ávaring

**Um dómarin í Føroya rætti er samdur við Fiskiveiðieftirlitinum og ákæruvaldinum og dømir Vesturvarða og Vesturskin at missa fiskiloyvini í 14 dagar, er stýrimaðurin á Vesturskin í vanda fyri at vera skuldsettur fyri at hava sagt ósatt í rættinum**

ÓLÓGLIGUR FISKISKAPUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*




*Vestgurvarð og Vesturskin liggja í Havn og bíða eftir úrskurðinum hjá Føroya rætti*

Í seinasta lagi mánadagin kemur Føroya rættur við úrskurðinum, um Fiskiveiðieftirlitið bar seg rætt at, tá ið tað 5. september tók fiskiloyvini frá partrolarunum Vesturvarða og Vesturskin fyri at hava trolað í einum stongdum kassa á Fugloyarbanka.

Sektaruppskotið, sum skipararnir fingu, var 100.000 krónur í bót hvør, og at halda varð lagt á veiðu og reiðskap. Tað hava teir góðtikið, og teir hava eisini viðgingið, at teir trolaðu á kassanum, sum stongdur varð 18. august á Fugloyarbanka til vernd av ungfiski.

Men teir góðtaka ikki eyka revsingina, at skipini skulu missa fiskiloyvi síni í 14 dagar.

Advokaturin hjá teimum helt tað vera órímiligt at taka fiskiloyvini frá teimum í 14 dagar, í øðrum lagi var ynskið, at loyvini vórðu tikin fyri eitt styttri tíðarskeið.

### Ætlaðu at ávara

Tað var vaktarskipið Tjaldrið, sum varnaðist, at trolararnir vóru inni í einum stongdum kassa á Fugloyarbanka, kassa U. Hesin kassin varð stongdur 18. august fyri allari trolveiði fyri at verja ungfiskin.

Stýrimaðurin á Tjaldrinum ringdi umborð á Vesturskin, og dagin eftir kom Tjaldrið til trolararnar, sum tá vóru uttanfyri kassan.

Tað kom fram í rættinunum, at fiskurin fjór umborð á Vesturvarða, og at bara hendinga ungfiskur var uppií.

Trolararnir vórðu bidnir um at fylgja við til Havnar.

Tann stóri spurningur í hesum málinum var, um skipini vistu, at teir trolaðu á einum stongdum øki.

Stýrimaðurin á Vesturskin var á vakt, tá ið Tjaldrið ringdi umborð og spurdi, um teir vistu, at teir trolaðu ólógliga. Tjaldrið bað teir um ikki at fara inn aftur á økið.

### Visti tað ikki

Í rættinum hósdagin segði stýrimaðurin á Vesturskin seg hava svarað, at tað visti hann ikki. Hann visti, at okkurt øki var stongt, men ikki hvat. Hann hevði so boðað frá til skiparan á Vesturvarða, hvat Tjaldrið hevði ringt um. Meira hevði hann ikki gjørt.

Skiparin á Vesturvarða segði, at hann ikki var greiður yvir, at økið varð stongt. Hann hevur altíð hildið, at tá ið eitt øki verður stongt, eigur tað at verða lýst í Tórshavn Radio, sum øll skip lurta eftir, og ikki bara í útvarpinum umframt í Kunngerðablaðnum.

Hann hevði eisini hoyrt í útvarpinum, at eitt øki varð stongt á Fugloyarbankanum, og hann hevði gjørt sær tann ómak at biðja Fiskiveiðieftirlitið um at faksa sær kunngerðina. Kunngerðarblaðið fekk hann, men teir vóru seinkaðir frá landi henda fyrsta túrin, og hann valdi at fara í koyggjuna, meðan teir sigldu út á fiskileið, tí fyri stavn stóð ein long vakt.

Hóast hann ikki hevði kannað, hvart stongda økið var, helt hann tað vera ólogiskt, at júst har fór at verða stongt. Hann visti, at ungfiskur gongur á grunnari sjógvi, og teir høvdu bara trolað, har djúpt var.

### Ein onnur søga

Spenningur kom í á rættarfundinum, tá ið stýrimaðurin á Tjaldrinum varð avhoyrdur sum vitni.

Hann greiddi frá, at hann hevði ringt umborð á Vesturskin, og tað var av tilvild, at hann ringdi til Vesturskin og ikki til Vesturvarða.

- Eg spurdi stýrimannin á Vesturskin, um hann var greiður yvir, at teir høvdu verið inni á stongdum øki, og hann segði ja. Eg byrjaði so at lesa upp posisjónirnar fyri stongda økinum, men tá ið eg hevði nevnt ta fyrstu, segði hann, at teir høvdu posisjónirnar, segði stýrimaðurin á Tjaldrinum, sum enn eina ferð svaraði spurningum.

Hann var vísur í, at hann segði seg hava posisjónirnar.

Frágreiðingin hjá stýrimanninum á Tjaldrinum fekk ákæran at biðja um at sleppa at avhoyra stýrimannin á Vesturskin umaftur.

Hann fekk fyri aðru ferð at vita, at sum vitni hevði hann skyldu til at tosa satt, tí tað er revsivert at lúgva í rættinum.

Hann helt fast við sína fyrstu forkláring. Hann visti ikki frammanundan, at teir høvdu verið á stongdum øki, og hann kendi einki til, hvar tað var. Hann mintist einki til, at Tjaldrið hevði bjóðað honum at fáa posisjónirnar.

### Teir vistu

So kom inn Ellintgur Abrahamsen, skipari á Tjaldrinum.

Hann var farin umborð á Tjaldrið 27. august, og tá fekk hann at vita, at Stelkur og Bakur høvdu verið á stongdu leið á Fugloyarbanka. Hann hevði ringt umborð til teirra, segði hvussu var, og bað teir halda seg burtur haðani. Síðan hevði hann ráðført seg við Elmar Højgaard, stjóra á Fiskiveiðieftrirlitinum, og teir vóru samdur um, at Stelkur og Bakur skuldu sleppa við eini ávaring, tí so fáir dagar vóru gingnir, frá tí at økið var stongt, og skipini visti tað ikki.

Við Vesturvarða og Vesturskin var støðan øðrvísi. Stýrimaðurin á Vesturskin hevði greitt sagt við Tjaldrið, at hann kendi posisjónirnar, og harnæst hevði skiparin á Vesturvarða biðið um at fáa Kunngerðarblaðið faksað umborð.

Høvdu teir verið líka lítið vitandi sum hinir, høvdu teir eisini sloppið við eini ávaring, segði Ellintur Abrahamsen, sum hevði fult álit á, at stýrimaður hansara talaði satt.

Elmar Højgaard, stjóri á Fiskiveiðieftirlitinum segði, at skip mangan fáa ávaring, hava tey verið á stongdari leið, men hesir áttu at vita, hvat teir gjørdu.

Hann kom inn á, at slík lógarbrot mugu merkjast.

### Álvarsmál

Í drúgvu proseduru síni kom ákærin Linda Hesselberg inn á, at munur er á at bróta eina lóg og eina kunngerð. Í hesum førinum snúði tað seg um brot á eina lóg, sum løtingið hevur samtykt við endamálinum at verja ungfisk. Løgtingið umboðar fólkið, og fiskurin er fólksins ogn. Skipini mugu fiska eftir teimum reglum, sum ásettar verða. Fiskiveiðieftirlitið umboðar fólkið og skal ansa eftir, at reglurnar verða fylgdar.

Linda Hesselberg gjørdi púra greitt, at hon ikki trúði tí, sum stýrimaðurin á Vesturskin hevði greitt frá. Tað kundi ikki passa, at hann ikki segði tað fyri nøkrum, sum hann hevði hoyrt í útvarpinum, at eitt øki var stongt. Hennara fatan var, at hann segði so bara fyri at verja reiðaríið, men tað var óklókt segði hon.

Hon helt tað eisini vera ov bíligt, tá ið skiparin á Vesturvarða umbar seg við, at hann ikki hevði lisið Kunngerðarbllaðið, tí hann skuldi sova.

Eisini kom hon við ábreiðslum móti reiðaranum, sum ikki hevði greiðar og fastur reglur fyri at tryggja seg ímóti, at skipini fiskaðu ólógliga.

### Mannamunur

Sakførarin hjá reiðarínum helt tað vera órímiligt at taka fiskiloyvini í tvær vikur frá Vesturvarða og Vesturskin, tá ið aðrari eru slopnir við ávaring. Hann helt tað eisini vera løgið, at skip kunnu sleppa uttan revsing, bara tí tey ikki kendu reglurnar, tí soleiðis er ikki við øðrum lógarbrotum. Eitt nú sleppur eingin við eini ávaring, um tey bróta ferðslulógin, koyra við kenning ella koyra ov skjótt.

Komið var ikki nærri inn á mótstríðandi upplýsingarnar frá stýrimanninum á Vesturskini og stýrimanninum á Tjaldrinum.

Tað verður kanska ein onnur søga.

Dómarin kemur sum nevnt við úrskurðinum í seinasta lagi mánadagin.